Bilar

Nr. 133 • fríggjadagur • 15. juli 2005 • 79. árg.

## VW Fox 1,2

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1,2 litur 4 syl. bensin 55 hk |
| 0-100 km/t | 17,5 sek |
| Bensinnýtsla | 16,4 km/l (blandað koyring) |
| Dekkstødd | 165/70-14 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 382,8 cm |
| Breidd | 166,0 cm |
| Hædd | 154,4 cm |
| Eginvekt | 975 kg |
| Viðførisrúm | 260 litrar |

Prísur kr. 147.000,- (við DK-pakka)

Søluumboð
Bilasølan

Vegurin Langi
FO-188 Hoyvík
Tel. 315354
www.bilasolan.fo

# Fox er ein veruligur Fólkavognur

**Kappingin um kundarnar í mini-klassanum harðnar alla tíðina. Nú eru Volkswagen komnir við einum ektaðum Fólkavogni, VW Fox, sum er einfaldur og orkusparandi**

Bilar
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Við VW Fox er Volkswagen-konsernin komin við ein veruligum Fólkavogni - einum bili til fólkið, sum eisini var upprunaliga ætlanin, tá fyrsti Fólkavognurin kom á marknaðin fyri meira enn 60 árum síðan. Filosofiin hjá VW er, at Fox skal vera bíligur og orkusparandi.

Fox er ein 4-persónabilur við trimum hurðum. Hann er umleið 30 cm longri, 3 cm breiðari og næstan 10 cm hægri enn VW Lupo. So talan er um ein væl størri bil. Tað at bilurin er hægri, merkist serliga við at setrini sita høgt og útsýnið gott allar vegir. Rattið kann stillast bæði í hædd og aftur og fram, so lætt er at finna sær ta heilt røttu koyristøðuna.

Elektromekaniska servostýringin hevur tann fyrimun, at hon alla tíðina lagar seg til ferðina. Undirvognurin virkar væl, 14" hjól eru standard, og bilurin er stúttur og koyrieginleikarnir góðir. Hóast Fox er sum gjørdur til býkoyring, virkar hann ikki so lítil at koyra, tí koyrieginleikarnir eru sum á einum nógv størri bili.

## DK-pakki

Fox fæst við tveimum ymiskum bensinmotorum: 1,2 litur við 55 hk og 1,4 litur við 75 hk. Av trygdarútgerð kunnu vit nevna, at bilurin hevur airbag framman og í síðunum, og 1,4 útgávan hevur ESP sum standard. Við øll fýra sitiplássini eru 3-punkts trygdarbelti og nakkastúttur. Umframt aðra eykaútgerð fæst Fox við DK-pakkanum við t.d. el-síðuspeglum v. hita, el-síðurútum framman, og fjarstýrdum sentrallási.

Ikki minni enn seytjan ymisk pláss eru til at leggja leysar lutir frá sær á. Ein rúmlig skuffa er eisini undir førarasetrinum. Millum baksetrini er ein boks við eini hill og kopphaldarum. Viðførisrúmið er 260 litrar, men við baksetrunum løgd niður verður tað 1.016 litrar.

VW Fox kann síggjast og roynast hjá Bilasøluni í Hoyvík, og prísirnir byrja við kr.143.000,- fyri ein 1,2 litur við 55 hk.




*VW Fox er ein ektaður Fólkvognur. Talan er um ein 4-persónabil við trimum hurðum*




*Einfalt og smart design. 14" hjól eru standard*



*VW Fox innan. Rattið kann stillast bæði í hædd og aftur og fram, so lætt er at finna sær ta heilt røttu koyristøðuna*